FFU hevur sett seg í samband við ráðgevarar, sum hava ráðgivið felagnum í hvørjar skattligu avleiðingarnar eru fyri limir felagsins eftir teimum broyting sum eru gjørdar í føroysku skattalógini. Ráðgeving til felagið er m.a. frá føroyskum skattaserfrøðingi.

Sum útrokningar og ráðgeving til felagið vísur, so kann staðfestast, at fiskimaðurin í Norra hevur eitt hægri skattatrýst samanborið við fiskimannin í Føroyum, umframt at fiskimaðurin í Norra er verri stillaður, tá ið umræður hansara eftirlønar viðurskiftir.

Tí heldur FFU at hesi viðurskiftir eiga at geva rætt til ein inntøkufrádrátt fyri gjaldið til Norsk Folketrygd, eins og m.a Danmark ger fyri ein danskara í arbeiðir í Norra , og rindar til Norsk Folketrygd.

Eisini kann nevnast at flestu lond rundanum okkum geva frádráttir til borgarir í arbeiða uttanlands, sum eina kompensasjón fyri at hesi fólk eru burtur frá heimi og familju í stóran part av árinum.

Vegna nevndina í FFU

Einar Martin Hammer

Formaður